ÚT AT KOYRA

Volvo vir›isløn fyri trygd



Fyri sættu fer› sí›an 1988, hevur Volvo fingi› bretsku trygdarvir›islønina “The Prince Michael International Road Safety Awards”. Hesa fer› var ta› fyri n‡ggju trygdarmi›stø›ina í Gøteborg, sum testar bilarnar eftir n‡ggjum normum og standardum.

Kelda: Motor Magasinet

Pajero Pinin

Mitsubishi Pajero Pinin, sum er tekna›ur av Pininfarina í Ialia, kemur nú í eini útgávu vi› fimm hur›um, og 2,0 litur GDI motori vi› 129 hk.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Reinari Opel motorar

Opel bilarnir koma nú vi› størri og betri motorum, i› lúka Euro 4 treytirnar fyri dálking í 2006.

Kelda: Motor Magasinet

Magentis er ein elegantur og vælgjørdur bilur. Innan er hann vælútgjørdur, serliga í luksusútgávuni

Magentis kemur fyri Clarus í vár

BILAR
Magnus Gunnarsson

Komandi vár ver›ur Kia Clarus tikin av skránni, og skiftur út vi› ein n‡ggjan Kia Magentis, sum eftir ætlan skal kappast vi› eitt nú Toyota Camry, Honda Accord og VW Passat.

Ikki serliga koreanskur

Í Korea er ta› Hyundai sum eigur Kia bilaverksmi›juna, og sæst ta› tí›uliga aftur í Magentis sum hevur sama plattform sum Hyundai Sonata. Bilurin i› ikki sær serliga koreanskur út, er gjørdur vi› europeiska og amerikanska markna›in fyri eyga›. Magentis er ein elegantur og vælgjørdur bilur. Innan er hann vælútgjørdur, serliga í luksusútgávuni, vi› le›ursetrum og annars øllum sum hugsast kann til ein bil í luksusklassanum.

Einans sum persónvognur

Fólk frá FDM hava veri› í Korea og royndarkoyrt Magentis, sum hevur tveir motorar at velja ímillum, ein 2,0 litur vi› 4 syl. og 136 hk.. Hin motorurin er ein 2,5 litur V6 vi› 168 hk. sum einans fæst vi› Tiptronic-automatik gearum, og hevur aircondition og antispinn sum standard. Magnetis ver›ur ikki gjørdur sum stationvognur, tí ætlanin er at Kia Carens,

i› er ein MPV, sum er bygdur yvir sama plattform, skal nøkta tørvin hjá teimum sum vilja hava ein stationvogn. Prísin vita vit onki um enn, men koreanarnir plaga at vera kappingarførir á tí økinum.

Kelda: Bilen Motor & Sport

Mazda fer at gera bilar í Europa

BILAR
Magnus Gunnarsson

Fleiri av japansku bilunum eru ikki so japanskir longur, sum teir einafer› vóru. Fyri at kappast á europeiska markna›inum, ver›a fleiri japanskir bilar gjørdir í Europa, sum til dømis Honda, Toyota og Nissan, sum nú í fleiri ár hava framleitt bilar í Onglandi. Nú skulu Mazdabilar eisini gerast í Europa.

100.000 bilar árliga

Avger›in um at framlei›a Mazdabilar í Europa er tikin saman vi› Ford, sum eigur 34 prosent av Mazda fyritøkuni. Í 2002 byrjar framlei›slan av bilum í Demio og 323 støddunum. Avgjørt er ikki enn hvar í Europa framlei›slan ver›ur, men ta› ver›ur á einari Ford verksmi›ju í Onglandi ella T‡sklandi. Ætlanin er at gera 100.000 bilar árliga. Hjá Mazda í Japan merkir hetta at eini 1800 starvsfólk mugu leita sær eftir ø›rum arbei›i.

Mazda og Ford somu plattformar

Orsøkin til hesa avger› er at kursurin á japanska yeninum er so høgur at Mazdabilarnir hava ringt vi› at kappast á europeiska markna›inum. Mazda stjórin í Europa, 48 ára gamli nor›ma›urin Jan Brentebråten,

sigur at Mazda og Ford fara at brúka somu plattformar í framtí›ini. Hetta kemur at síggjast aftur í at komandi Mazda bilarnir fara at hava meira spennandi og ungdómsvinarligari modell.

Kelda: Motor Magasinet

ÚT AT KOYRA

Vetrarkoyring vi› píkum ella lamelldekkum

BILAR
Magnus Gunnarsson

Nú gó›an mána›a eftir at loyvt var› at koyra vi› píkum, og so gott sum ongin kavi hevur veri›, eru ta› fleiri fólk sum spyrja um nøkur meining er í at so nógvir bilar koyra vi› píkadekkum. Ta› sæst best á bilunum sum ver›a díktir undir í runu og asfalti. Píkadekkini mugu metast sum ein orsøk til at so er.

Tey ymisku bilmerkini skulu eisini testast og samanberast til vetrarkoyring

Skifta beinanvegin

Ein orsøk til at so nógvir bilar koyra vi› píkum, longu nú á›renn kavin er komin, er at tey eru fleiri sum vilja hava píkadekkini á bilin beinanvegin ta› er loyvt. Tí tá kavin kemur, koma øll í senn at fáa dekkini skift, og ringt er at sleppa framat á dekkverkstø›unum. Hetta er eisini galdandi fyri fyritøkur sum hava fleiri bilar, sum skulu avsta› tí›liga um morgunin, á›renn vegirnir ver›a grivnir, ella salta›ir.

Píkar og trygd

Ofta hevur spurningurin veri› frammi um at banna píkadekkunum. Hetta er sjálvandi ikki so einfalt, tí ta› hev›i sett heilt onnur krøv til tey sum skulu halda vegirnar. Sí›an píkadekkini komu á markna›in, hevur veri› nógv skriving í blø›unum, bæ›i fyri og ímóti hesum dekkum. Rættuligt rok vi› nógvari bla›skriving um píkar og trygd tók seg upp í sjeytiárunum, tá ein landst‡risma›ur leg›i uppskot fram um at banna píkadekkunum. Úrsliti› av hesum var›, at lóg bleiv sett í gildi um, at persónbilar skuldu hava píkadekk á øllum f‡ra hjólunum, lastbilar og bussar kundu tó hava píkar aftan ella framman.

At banna píkadekkunum hev›i sett heilt onnur krøv til kavarudding og salting av veganetinum

Lamelldekk, eitt alternativ

Ta› er ikki bara her hjá okkum at kjak hevur veri› um píkadekkini, sum slíta vegirnar og dálka umhvørvi›. Píkaanstø›ingurin Petur Hermansen í Havn, sigur í eini vi›merking, at í Noreg skal man gjalda 320 krónur um mána›in fyri at koyra vi› píkum, og í teimum størru b‡unum kostar ta› 25 krónur eyka um dagin at koyra vi› píkum. Eisini sigur hann at japanarar hava banna píkunum vegna dálking og heilsuvandan. Ta› at fyrrverandi Vesturt‡skland setti bann fyri at brúka píkadekk, setti veruliga gongd á menningina av lamelldekkunum. Hesi dekk vór›u ein sonn kollvelting innan vetrardekk, bæ›i gummiblandingin, og ta› at puntarnir í dekkunum eru skornir sundur í smáar lamellur.

Vir›a umhvørvi ›

Hvussu man skø›ir bilin til vetarakoyring, valdast hvar í landinum man b‡r, og hvar man koyrir dagliga. Tey sum búgva í Havn og koyra her á meginøkinum, skuldu klára seg væl vi› lamelldekkum, sum eru sera gó› í frosti og kava. Píkarnir gera mest nyttu á vátum ísi. Sjálvandi skal altí› koyrast eftir umstø›unum.

Tey sum koyra vi› píkum, og hava vir›ing fyri umhvørvinum, keypa sær píkadekk á felgum, sum tey bert n‡ta í kava og tá hálka er, og taka tey av tá kavin ella hálkan er burtur.

ABS og antispinn

Vi› teimum framkomnu lamelldekkum sum fáast í dag, og flestu bilar hava ABS bremsur sum ikki blokera, eins og nógvir bilar eisini hava antispinn, skuldi als ikki veri› ney›ugt at so nógvir privatbilar koyra vi› píkum. Teir dagar tá brúk er fyri píkunum kunnu teljast á einari hond. Ta› vísir seg eisini at fólk sum koyra vi› dekkum uttan píkar eru meira ansin í hálku.

Vetrardekkini ver›a testa›i og betra›i alla tí›ina